FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

11. oktober 2021
Mál: 21/19851-3
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-043/2021

Svar til fyrispurning 52-043/2021 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um virðisøking, nýskapan og menning og aðrar treytir í avgerðum um vinnuligar royndir og verkætlanir

Spurningar:

1. Hvørjar eru tær skjalfestu grundgevingar um virðisøking, nýskapan og menning í teimum játtanum, ið eru givnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, herundir játtan til ítøkiligt skipakeyp?

2. Hvussu er grundgivið og skjalfest, at tær kvotujáttanir, ið eru givnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir til ítøkiligt skipakeyp, eru tær, ið hava mest virðisøking, nýskapan og menning, soleiðis sum ásett er í kunngerð og tilhoyrandi skjølum?

3. Hvussu er skjalfest, viðgjørt og grundgivið, at tær verkætlanir, ið eru játtaðar, harundir til ítøkiligt skipakeyp, lúka treytirnar í viðmerkingum til lógina um, at øll lið í virðis- og framleiðsluliðnum ikki hava eigarar, ið hava ræði á meira enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær – og hvørjar eru hesar verkætlanir, ið als ikki hava tað?

4. Hvussu er staðfest og skjalprógvað, at tey, ið hava fingið játtan til ítøkiligt skipakeyp, hava lokið treytirnar um at hava keypssáttmála og fígging til ítøkiligt skip og at tey eru klár at byrja beinanvegin?

Svar:

Til nr. 1 og 2.
Tær skjalfestu grundgevingarnar eru í innanhýsis tilmælinum til landsstýrismannin, umframt í niðurstøðuni hjá landsstýrismanninum og í avgerðunum, sum eru sendar umsøkjarunum. Alt tilfarið er skrásett í journalskipanini hjá Fiskimálaráðnum.

Tríggjar verkætlanir hava fingið tillutað kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. í sjófeingislógini.

Kvota er latin tveimum umsøkjarum í sambandi við verkætlan, ið fevnir um ítøkiligt skipakeyp eftir § 49, stk. 1, 2. pkt. í sjófeingislógini.

Í sambandi við viðgerðina er útgangsstøði tikið í sjófeingislógini, kunngerðini um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, umsóknunum og teimum skjølum, sum umsøkjararnir sendu við umsóknunum.
Talan er í báðum førum um eina heildarmeting.

Í sambandi við tær vinnuligu royndirnar og verkætlanirnar eftir 1. pkt. hevur landsstýrismaðurin harafturat valt at raðfesta verkætlanir, sum heilt ella í stóran mun eru bygdar á uppsjóvarfisk, heldur enn at lata uppsjóvarkvotur til tann partin av vinnuni, ið hevur ríminliga støðugt virksemi grundað á botnfisk.

Í sambandi við kvotu til skipakeyp eftir 2. pkt. hevur landsstýrismaðurin harafturat lagt dent á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur.

Í slíkari meting vóru tvær ella møguliga tríggjar verkætlanir av teimum tilmæltu, ið luku báðar treytirnar; tað merkir lutfalsligan høgan eginpening og beinleiðis royndir.
Samlaði karmurin í tøkari kvotu avmarkar talið av verkætlanum til tvey skip.
Við grundarlagi í hesi meting og fyritreytum varð kvota latin 2 feløgum.

Til nr. 3.
Embætisbólkurin, sum viðgjørdi umsóknirnar, hevur í ivamálum kannað eigaraviðurskiftini.
Viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum eftir § 49, stk. 1, 1. pkt. er eisini hugt eftir, at felagið, har sjálv menningin, nýskapanin og virðisøkingin av fiskasløgunum er ætlað at fara fram, lýkur kravið í § 49, stk. 3 í sjófeingislógini. Hetta er skjalfest í sambandi við viðgerðina og grundgivið í avgerðunum.

Nakrar verkætlanir lúka ikki treytina í § 49, stk. 3, og er hetta grundgivið í avgerðarskrivunum til tey feløgini.

Til nr. 4.
Fyribils keypssáttmáli ella formligt tilboð til skip á sølulista og skjøl um fígging frá fíggingarstovnum eru hjáløgd umsóknunum og eru goymd í journalskipanini hjá Fiskimálaráðnum. Tey feløg, ið hava fingið játtan til ítøkiligt skipakeyp, hava fingið 4 vikur at fáa m.a. endaligan keypssáttmála og endaligu fíggingina upp á pláss.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður